# Fara at søkja um stuðul til røktarheim í Vági

**Tað er nú greitt, at nakrar kommunur í Suðuroy fara at søkja landsstýrið um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim í Vági**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eisini suðuroyingar fara at søkja landsstýrið um stuðul til at byggja ellis- og røktarheim í Vági.

Tað er greitt eftir býráðsfund í Vági fríggjakvøldið.

Vágs Býráð varð kallað saman til eykabýráðsfund fríggjakvøldið at viðgera spurningin um Vágs Kommuna skuldi søkja landsstýrið um stuðul at byggja ellis- og røktarheim í Vági saman við Sumbiar- Porkeris- og Hovs kommunu.

Tað, sum upprunaliga lá í kortunum, var royna at fáa allar kommunurnar at vera saman um eitt ellis- og røktarheim í Vági, men tað er Tvøroyrar Kommuna ikki sinnað til- ikki fyribils í øllum førum. Samstundis er støðan hjá Hvalbiar bygdaráðið tann, at teirra kommuna er bara við í eini slíkari ætlan, um allar kommunurnar eru við. Heldur ikki fámjinginar hava givið tilsøgn um at vera við í eini ætlan um ellis- og røktarheim í Vági.

Sostatt datt ætlaða felagsverkætlanin niðurfyri, men síðani hava tær fýra kommunurnar í syðru helvt kannað møguleikar at byggja eitt ellis-og røktarheim sjálvi og eftir fund við landsstýrið er eisini greitt, at landsstýrið er sinnað at ganga eini umsókn frá suðuroyingum á møti, hóast allar kommunurnar ikki eru við.

Tær fýra kommunurnar, sum eru sinnaðar at byggja ellis-og røktrheim í Vági, eru Sumbiar- Vágs-Porkerisog Sumbiar Kommuna og sostatt er Suðuroyggin farin í tvey í hesum máli.

Og á býráðsfundi í Vági fríggjakvøldið, skuldi Býráðið taka støðu til um Vágs kommuna varð sinnað at vera við í eini slíkari ætlan.

Freistin at søkja um stuðul úr landsstýrinum til Ellis- og røktarheim, er úti í morgin og tí hevði málið skund.

Og tað endaði eisini við, at ein meiriluti av býráðnum atkvøddu fyri uppskotinum og sostatt fær landsstýrið eisini eina umsókn úr Suðuroy at byggja ellis- og røktarheim í Vági.

Fimm býráðslimir atkvøddu fyri. Teir vóru tey bæði javnaðarumboðini, Kirstin strøm Bech, borgarstjóri og Eyðfinn Mørk. Fyri atkvøddu eisini bæði umboðini hjá uttanflokkalistanum, Poul Augustinussen og Sølvi Andreasen og sambandsmaðurin, Svenning Borg.

Ímóti atkvøddu teir tríggir tjóðveldismenninir, Hans Joensen, Jógvan Krosslá og Dánjal Bjarkhamar, og sambandskonan, Ásgerð Stenberg.



*Hugsunnarsamir býráðslimir í Vági á fundi fríggjakvøldið, har stórar avgerðir vórðu tiknar. Frá vinstru eru tað Poul Augustinussen, Sølvi Andreasen og Sennin Borg, sum allir taka undir við at byggja ellis- og røktarheim í Vági og Ásgerð Stenberg, sum atkvøddi ímóti*

# Fáa rentufrítt lán til røktarheim í Vági

**Nú er loksins greitt, hvussu lyftið hjá samgonguni skal tulkast um serliga lagaliga fígging til kommunurnar í Suðuroy ellis- og røktarheim í Vági**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fara suðuroyingar at byggja ellis- og røktarheim í Vági, fara teir at fáa eitt serliga lagaligt tilboð um fígging av einum slíkum heimi.

Samgongan hevur ásannað, at Suðuroy er í eini serstøðu og hevur tí lovað suðuroyingum serliga lagaliga fígging, fara teir undir at byggja ellis- og røktarheim í Vági.

Umframt at nøkta tørvin á eldrarøkt, hevði eitt slíkt heim eisini skapt nógv arbeiði og tað er ein orsøk til, at samgongan er sinnað at gera eina serliga fíggingarskipan fyri Suðuroynna.

Síðani hava suðuroyingar saknað, at landsstýrið setti nágreinilig tøl, á hvat tað hugsaði um, tá ið tosað varð um lagaliga fígging.

Men á býráðsfundi í Vági í fríggjakvøldið, hevði borgarstjórin eitt ítøkilig tilboð frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum við í skjáttuni.



*Fitt av fólki var komið á býráðsfund í Vági fríggjakvøldið at lurta. Tey fingu at hoyra, at landsstýrið hevur bjóðað kommununum í syðru helvt rentufrítt lán í 10 ár at byggja ellis- og røktarheim fyri í Vági*

Bárður Nielsen sigur, at landsstýrið er sinnað at standa við tilboðið um serliga lagaliga fígging til eitt ellis- og røktatrheim í Vági, hóast tað nú bara eru tær fýra kommunurnar í syðru helvt, Vágur, Sumba, Porkeri og Hov, sum eru við í ætlanini.

Um hinar so koma við seinni, fer so at vísa seg, men hurðin stendur opin, so tær kunnu koma uppí, vilja tær tað.

Í sambandi við ellis- og røktarheim í Vági, hevur landsstýrið sostatt bjóðað kommununum í Suðuroy at landið skal fíggja alla bygginina í byggitíðini.

Ikki fyrrenn heimið er liðugt og fer at skapa inntøku, skulu kommunurnar byrja at betala sín part av fíggingini til landið.

Í hesum sambandi hevur landið bjóða kommununum eitt rentufrítt lán, sum skal betalast aftur eftir 10 árum, frá tí at heimið stendur liðugt.

Samstundis skal grundstykkið og byggibúningin roknast upp í byggikostnaðin.

### 22 milliónir til kommunurnar

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, segði á býráðsfundinum í Vági fríggjakvøldið, at eitt heim til 32 búfólk kostar góðar 38 milliónir, kanska eitt sindur minni.

Av hesum betalir landið 500.000 fyri hørt búfólk, ella 16 milliónir tilsamans.

Eftir eru sostatt góðar 22 milliónir, sum kommunurnar í syðru helvt sjálvar skulu fíggja.

Borgarstjórin í Vági sigur, at eftir fólkatalinum í Vágs Kommunu, verður tað 14 milliónir, sum vágbingar skulu betala, sumbingar skulu fíggja 4 milliónir, Porkenningar skulu fíggja 3,5 milliónir og hovbingar 1,3 millión.

Fyri Vág merkir hetta, at kommunan skal betala 1,4 millión um árið, um so er, at onki verður sett av fyrrenn heimið er liðugt og tað er ætlandi í 2009.

Men byrjar kommunan at seta pening av beinanvegin, skal ein millión setast av um árið.

Hon legði afturat, at royndirnar av heiminum í Sundalagnum vísti, at tað kostaði nakað minni enn 1,2 millión fyri hvørt búfólk, sum heimið er mett at kosta. Heimið í Sundalagnum kostaði 1,1 millión fyri hvørt búfólk, og tá var alt púra liðugt, bæði uttan og innan.

Verður hetta prísurin, fer eitt heim í Vági at kosta góðar 35 milliónir og sostatt verður parturin hjá kommununum eisini nakað minni.

# Skapar

**Kommunurnar í syðru helvt í Suðuroy fara nú at søkja landsstýrið um stuðul til at byggja heim til eldri í Vági til 32 búfólk. Tað fer at skapa 62 arbeiðspláss, segði borgarstjórin á býráðsfundi í Vági fríggjakvøldið**

# Lógarbro

**Tjóðveldisflokkurin í Vágs tvíhelt um, at tað var lógarbrot, at Vágs Býráð fríggjakvøldið samtykti at søkja um stuðul úr landskassanum til at byggja ellis- og røktarheim í Vági. Nei, sigur borgarstjórin**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er brot á lógina, at Vágs Býráð fríggjakvøldið samtykti at søkja landið um stuðul at byggja ellis- og røktareheim í Vági, saman við kommununum í syðru helvt í Suðuroy.

Tað hildu tveir av tjóðveldismonnunum í Vágs Býráði Jógvan Krosslá og Dánjal Bjarkhamar, fast um.

Teir báðir vísti eisini á, at borgarstjórin hevði áður fingið heimild fra býráðnum at tingast um at byggja ellis-

# Ikki ráð at

**Býráðslimir í Vági, sum eru ímóti uppskotinum at byggja ellisheim í Vági, siga, at tað er ikki fíggjarliga forsvarligt. Meirilutin sigur, at sambýlið kostar kommununi líka nógv, sum ellisheimið, men ellisheimið gevur nógv meir**

ELDRARØKT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Við teirri fíggjarligu orku, sum er í syðru helvt